**Kappingarreglur og góður atburður**

## *Á vøllinum :*

- *íðkarar døma á egnum vølli og virða avgerðir hjá mótspælara*
- *Íðkarar døma sum teir sjálvir síggja, er ivi verður bólturin givin mótspælara ella spældur umaftur*
- *At rópa ella at kasta við ketjara er ikki loyvt*
- *Ein kann væl vísa gleði og nøgdsemi yvir gott spæl*
- *Vís virðing fyri veikari spælara, at baktala er ikki gott*
- *Eggja viðleikara og gev rós, niðurgerðing gevur tap*
- *Íðkarar takka pent fyri dystin um hann er vunnin ella taptur*

## *Uttan fyri vøllin:*

- *Venjari/foreldur/verjar/áskoðarar blanda seg ikki uppí meðan dysturin verður spældur*
- *Venjari/foreldur/verjar/áskoðarar blanda seg ONGANTÍÐ uppí um ein bóltur er inni ella úti*
- *Venjari /foreldur/verjar, hjálpa og geva góð ráð, tá ið pausir eru í einum dysti, um spælt verður uppí 21, kunnu góð ráð gevast tá komi er upp til 11*
- *Um klappað og heppað verður, gevur tað vilja at vinna, men virðing skal eisini vísast mótspælara*
- *Tað er niðurgerandi at klappa um mótspælari ger feil*
- *Teljarar eru bara teljarar og ikki dómarar*
- *Teljari og spælari kunnu koma frá sama felag, um teljari virðir hesar reglur*